


**Nr. 9** *24. apríl 2022* **82. árg.**

# Kraftin í Faðir vár

Á einum møti uppi í Meinigheitshúsinum tosaði ein kona. Millum annað kom hon inn á, hvat ið bønin „Faðir vár“ kann avrika. Hon segði nakað soleiðis: Amerikumaðurin Kenneth Bailey (1930–2016), sum bæði var prestur, professari og rithøvundur, fór til Riga í Lettlandi at halda ein fyrilestur, stutt eftir at kommunisman var fallin. Hann var spentur at hitta tey kristnu har. Eftir fyrilesturin kom hann at sita saman við einari ungari gentu. „Ert tú vorðin kristin, av tí at tú loyniliga hevur lisið í Bíbliuni?“ spurdi hann.

„Á, nei, nei,“ svaraði hon. „Vit høvdu ikki loyvi at hava nakra Bíbliu.“ – „Íðan, hevur onkur omma biðið fyri tær?“ spurdi hann.

„Nei, nei,“ svaraði hon, „øll í míni familju eru ateistar, gudloysingar.“

„Men hevur tú so kanska verið til gudstænastu í onkrari undirgrundarkirkju?“

„Nei, tað havi eg ikki.“

„Hvussu ber tað so til, at tú ert vorðin trúgvandi?“ spurdi Kenneth. „Jú, tað var eitt, sum vit fingu loyvi til, og tað var, at tá ið onkur skuldi jarðast, so var loyvt at biðja „Faðir vár“. Eg undraðist nógv á, hvør ið hesin „Faðir vár, sum er í Himlunum“, mundi vera. Tað fekk eg ikki kannað, fyrr enn land okkara varð frælst, og eg fekk keypt mær eina Bíbliu. Tað vóru hasi orðini „Faðir vár, tú sum ert í Himlunum“, sum festu í meg, og eg tók við trúgv.“

Ja, hugsa tær, vit eiga ein pápa, sum býr uppi í Himlunum! Tað er stórt!

*Effie Campbell.*

# Hann lekir tey, ið hava eitt sundurbrotið hjarta

*Sálm. 147,3.*

Orsakirnar til eitt sundurbrotið hjarta kunnu vera so mangar. Sorg, vónbrot og mótgangur kunnu føra til, at vit gerast sjúk. Um so er, er neyðugt hjá einum menniskja ikki bara at verða grøtt fyri sjúkueyðkennini – men frá **tí orsøkini**, sum elvir sjúkuna. Jesus kom at lekja tey sundurbrotnu hjørtuni.

Eg havi kent menniskju, sum vóru so beisk inn á onnur, at tey gjørdust sjúk av tí. Eg havi kent onnur, sum vóru „moralskt“ sjúk og ikki høvdu ein glaðan dag, fyrr enn Harrin grøddi orsøkina til sjúku teirra. Eg havi kent nøkur, sum lótu angist og stúran oyðileggja heilsu sína.

Men uttan mun til, hvat ið elvir líðingar tínar – Harrin er mentur at lekja tær. Hann vil lekja ta pínuna í hjarta tínum, sum er orsøkin til pínuna í likami tínum. Hann vil lekja tann innara trupulleikan, sum pínir teg. Hann fer til **rótina** á trupulleikanum og viðger **hana** staðin fyri sjúkueyðkennini.

Lít upp til hansara í hesi løtu. Minst til, at hann kom til jarðar at taka tínar líðingar og bera tær niðan á krossin, so at tú kundi gerast fríur. Lova honum at taka títt sundurbrotna hjarta, og vita, um ikki góð heilsa verður úrslitið av tí unduri, hann ger í hjarta tínum!

Grøð hjarta mítt, Harri, og fría meg frá tí, sum ger meg sjúkan. Eg trúgvi, at tú gert tað!

*Oral Roberts. – Effie Campbell* umsetti.

# Sálarfíggindin oyðileggur

*Emanuel Minos*

Í Matt. 24,15 lesa vit: „Tá ið tit síggja andstygd oyðingarinnar, sum talað er um av Dánjal profeti, standa á heilagum staði – tann, ið hetta lesur, hann gevi tí gætur...“

Í 1956 las eg í Oxford. Eg sat og gjørdi skúlatingini og hugsaði als ikki um nakað andaligt. Tá talaði Guds Andi til mín. Åse, kona mín, kann vátta, at hetta er satt. Eg bleiv ógvuliga kløkkur. Andin segði við meg, at í endatíðini fór sálarfíggindin at oyðileggja trý ting. Fyri tað **fyrsta** fór hann at

herja á og oyðileggja hjúnaløgini. Ein tjóð verður ikki bygd upp á einum ítróttarvølli, einum háskúla ella á einum virki. Men hon verður bygd upp í heimunum. Tá heimini fara í sor, syndrast landið.

Fyri tað **næsta** fer sálarfíggindin at herja á meinigheitirnar. Meinigheitirnar eru longu farnar í tvey. Ein partur tekur Guds orð í álvara, meðan hin parturin heldur, at hatta var bara í gildi fyrr. Men Gud er eingin vingliskøltur, og hann broytist ikki og skiftir ikki meining, og tað ger hansara orð heldur ikki. Tað, sum ikki var loyvt fyrr, er heldur ikki loyvt í dag. Tað, sum var synd fyrr, er eisini synd í dag. Vit hava tíðarandan og rákið ímóti okkum.

Men vinir, tað finst eingin „Kristindómur Light". Vit mugu taka Guds orð í álvara og ikki snikka tað til eftir tíðini. Sannur og livandi kristindómur hevur ongantíð verið væl líddur. Jesus segði: „Hava teir forfylgt mær, fara teir at forfylgja tykkum." Vit mugu aftur til kelduna, sum er Bíblian og Guds Andi. Vit mugu gera, sum Ísakur gjørdi. Hann gravaði allar teir gomlu brunnarnar uppaftur, sum pápi hansara, Ábraham, hevði bygt, og sum fíggindin hevði fylt við mold. Vit mugu aftur til tað upprunaliga Guds orðið, tí tað inniheldur tað livandi vatnið. Vit mugu vera bíbliutrúgv.

Um vit hugsa um brøvini til tey 7 kirkjuliðini í Opinberingini, so eru tað tvær tulkingar av teimum. Onnur sigur, at hetta eru kirkjuliðini upp gjøgnum tíðirnar, og skal eg meta um, hvar ið vit eru stødd nú, so sigi eg í kirkjuliðinum í Laodikea. Jesus sigur um hetta kirkjuliðið: „Tí, av tí at tú ert flógvur, og ert hvørki heitur ella kaldur, skal eg spýggja teg út úr munni mínum." Opb. 3,16. Tað er álvarsligt!

Fyri tað **triðja** fer sálarfíggindin at herja á Ísrael. Og tað er tað, sum vit dag og dagliga hoyra um í fjølmiðlunum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Streingjakórini

***Ein maður talaði á einum húsmøti í Havn:***

Streingjakórini hava havt alstóran týdning. Allur ungdómurin í okkara bygd sang við í streingjakórinum. Vit ferðaðust landið runt til missiónsvikurnar, har vit sungu og vitnaðu. Vit bóðu nógv og upplivdu stór undur; men tey eldru dámdi ikki at tosa

um tað, tí tey hildu, at tað var millum Gud og tann einstaka persónin, og tað mugu vit so virða. Annars sigur Guds orð: „Greinið fólkanna millum undurverk hans!“ Sálm. 96,3. Vit brúktu Jesu egnu uppskrift. Harrin sigur, at tað er altso ikki alt, sum fer út, uttan við bøn og føstu (Matt. 17,21). So vit fastaðu eisini.

Tað er av alstórum týdningi, at vit halda okkum til „eldin“. Byrja vit at slaka við bíbliulestri, bøn og at koma saman, doyr okkara andaliga lív. Øll tey, sum vóru í streingjakórinum eru varðveitt í dag, og nógv eru enn virkin.

Fleiri føroyingar hava verið á bíbliuskúla í Staffelsgata í Oslo. Hin kendi bíbliulærarin, Elna Kvellestad, segði einaferð nakað, sum hevur fylt mær alt lívið:

Ein gomul kona lá á sjúkrahúsi og var ógvuliga sjúk. Meinigheitin savnaðist kring song hennara, og hvør einstakur bað eina bøn. Tá ið tann síðsti hevði biðið, fór gamla konan sjálv at biðja: „Harri, læt eina hurð standa opna, nú, tá ið eg komi!“ Hini høvdu biðið Harran grøtt hana, men vit skulu ikki vera her allar ævir, og gamla konan skilti, at nú var hennara tíð komin.

*Effie Campbell.*

# Menningarlæran – Darwinisman

Tá ið talan er um møður, stóð eitt skelti við eina kirkju: „Um menningarlæran hjá Darwini er røtt, hvussu ber tað so til, at møður framvegis bara hava tvær hendur?“

Og sum tað stóð á FB nú um dagarnar: Um menningarlæran er røtt, hvussu ber tað so til, at apur eru til enn, og hví síggja vit so ikki ein skapning, sum er hálvur apa og hálvt menniskja?

NEI, tað skal ein stór trúgv at trúgva slíkum heilaspuna!!!

*Effie Campbell* umsetti.

---

Eg havi eina T-skjúrtu. Á henni stendur: PUSH. Bókstavirnir standa fyri: „Pray Until Something Happens.“ Bið til okkurt hendir.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 24. apríl | **Tekstur:** | Luk. 18,9-14 | **Bíbliuorð:** | Matt. 7,7 |
| 1. mai | **Tekstur:** | Matt. 14,22-34 | **Bíbliuorð:** | Matt. 14,27 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 10** ***8. mai 2022*** **82. árg.**

# Tómrúmið

Tað var Charles prinsur av Onglandi, sum segði, at hóast vísindin er komin langt, so er tað djúpt niðri í sálini enn ein støðugur ófriður, sum boðar frá, at okkurt restar í, okkurt, sum ger lívið vert at liva.

Tað er eitt hol, eitt tómrúm, innan í menniskjunum, og uttan mun til, hvussu nógv av mati og drekka, tey fylla upp í tað, hvussu nógvar bilar og sjónvarpstól, skikkilig børn og trúfastar vinir tey seta upp fram við kantin á holinum, so pínir tað støðugt, tí tómrúmið er enn har.

Nei, eingir lutir og eingir vinir kunnu nøkta okkara tørv í so máta. Tað kemst av tí, at vit eru skapað at liva í felagsskapi við Gud. Jesus segði: „Eg eri vegurin.“ Hann er hin einasti, sum kann føra okkum inn í eitt samband við Gud, sum heldur á inn í ævinleikan.

Tá ið eg var barn, høvdu vit eitt svart-hvítt sjónvarp. Myndirnar vóru kámar og ótýðiligar, og ofta vóru rípur á sjónvarpsskíggjanum. Men vit vóru nøgd, tí vit vistu ikki betur. Ein dagin skiltu vit, at vit høvdu brúk fyri einari uttandura antennu. Brádliga sóu vit, at tað ber til at fáa myndina klára. Upplivingin at hyggja í sjónvarp broyttist fullkomiliga. Lívið uttan samband við Gud gjøgnum Jesus Kristus er sum eitt sjónvarpstól uttan antennu.

Jesus kom at geva okkum ævigt lív. Ævigt lív er ein lívsgóðska, sum sprettur frá lívinum, sum tú livir í felagsskapi við Gud og Jesus Kristus (Jóh. 17,3). Jesus lovaði ongantíð nøkrum eitt lætt lív, men hann lovaði lív í yvirflóð (Jóh. 10,10).

Bið Jesus fyrigeva tær syndirnar og bjóða honum inn í títt hjarta, so fyllir hann tómrúmið. Les í Bíbliuni og bið t.d. tvær, tríggjar ferðir dagliga. Far í kirkju og á møti, tá styrknar tú í tínum gudsbarnalívi.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vissan

Fyri árum síðani búði ein maður, Karl Madsen at navni, í býnum Haderslev.

Hann greiðir frá, at hann, frá tí at hann var blaðungur, so fegin vildi blíva frelstur; men trupulleikin var, at hann var ikki vísur í, um hann var frelstur ella ikki.

So bar á, at J. J. Adam, ein prædikumaður úr Skotlandi, kom har til býin at halda møtir í 1931.

Eitt kvøldið, tá ið møtið var liðugt, sigur Mr. Adam við Karl: „Um eg segði við tygum, at tygum vóru frelstur, høvdu tygum so trúð mær?“ – Karl svaraði aftur, at hann ikki hevði verið heilt vísur í tí.

So tók Adam aftur til orðanna og segði: „Um nú Gud segði, at tygum vóru frelstur, høvdu tygum so trúð honum?“

Tá svaraði Karl straks aftur: „Á, ja, um Gud segði tað, so hevði eg ikki ivast eina løtu í tí.“

„Tað er gott,“ segði Mr. Adam, „tí Gud sigur tað.“ Síðani læt hann Bíbliuna upp á Jóh. 5,24 og las: „Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum: Tann, sum hoyrir orð mítt og trýr honum, sum sendi meg, **hevur** ævigt lív og kemur ikki til dóms, men hann hevur stigið yvirum frá deyðanum til lívið.“

Frá tí kvøldinum var eg vísur í, at eg var frelstur, vegna myndugleikan í Guds orði.

„*Mit livs Gud*“ – *Effie Campbell* umsetti.

# Vit renna síðsta teinin

*Birger Wroldsen*

Vit liva fyri tí æviga. Tað størsta, tú kanst blíva í Himli, er at gerast Guds barn, og tað er alt av náði = gratis. Lívið er ein ferð, og vit hava ferðafylgi til heimsins enda. Tað hevur Jesus lovað. Jesus er ikki eitt steðgipláss, nei, hann er Vegurin, Sannleikin og Lívið. Jesus kemur skjótt, nú er ikki tíð at leggja seg niður, tí vit skulu fullføra renningina.

Tá ið vit renna, mugu vit ikki hava ov nógv viðføri, tað mugu vit seta frá okkum. Hebr. 12,1: „… seta av okkum eina og hvørja byrði og syndina, sum lættliga darvar, og við treysti renna tað skeið, sum okkum er fyri sett.“ Stúranir leggja ikki ein einasta dag til okkara lívslongd. Hvat gera vit so við angist og stúran: kasta tað á Harran, tí hann hevur umsorgan fyri okkum. (Sálm. 55,23).

Nú er tíð at reisast, nú skulu vit renna síðsta teinin. Harrin gevur nóg mikið av kraft og náði. Hygg rundan um teg. Nógv ógvisligt hendir úti í verðini. Vit skilja, at hetta er síðsti teinurin. Má Jesus finna okkum brennandi, gangandi, arbeiðandi og vakin. Tað, sum tyngir, mugu vit leggja frá okkum, serliga syndina. Jesus doyði fyri syndina. Gud kallar okkum til umvendingar í hesi tíðini, vit skulu venda okkum burtur frá syndini. Orðt. 1,23: „Vendið við.“ Hetta er Guds tilboð, tí eru vit á skeivum vegi, er tað fantastiskt at kunna venda um, so vit koma fram til rætta staðið.

OL-luttakarar nokta sær nógv fyri at vinna gull. Vit hava eitt nógv størri kall og ein størri sigursprís at vinna. Teir brúka einar 14–1500 tímar til venjing. Um vit høvdu brúkt líka nógva tíð til bøn, so var ikki ein óumvend sál eftir í tjóðini. Tað, sum avmarkar og hindrar tær, tað, sum tekur títt fokus og stjelur tína kós, legg tað frá tær. Tað kunnu vera góð ting, men tú hevur ikki stundir til tað, tú hevur ikki ráð til tað. Gev Jesusi tað, so tíni evni verða loyst. Gud vil brúka teg. Vit eru ikki her fyri bara at yvirliva. Vit eru her fyri at broyta verðina, „og við treysti renna tað skeið, sum okkum er fyri sett.“ Vit baktala ikki hvør annan, vit vælsigna hvør annan, tí kærleikin fjalir fjøld av syndum.

Vit „hvíla“ okkum og glíða burtur frá Gudi. Vit blíva bundin av tingum, sum ikki endiliga eru syndug, men tey hindra og avmarka okkum. Vit falla øll sum menniskju. Vit skulu ikki døma onnur. Vit falla út frá tí, sum vit eru vaksin upp í. Vit, sum eru vaksin upp í góðum heimum, falla niður í sofuna við fjarstýringini og blíva atfinningarsom mótvegis alt og øllum. Onnur falla til rús, men tað var har, tey komu frá. Men fall er fall. Tað hevur einki at siga, hvar tú fall, men nú er tíð at reisast aftur, sigur Harrin: „Gleð teg, mín fíggindi, ikki um meg; tí at eri eg fallin, fari eg aftur á føtur; tó at eg siti í myrkri, lýsir Harrin fyri mær.“ (Mika 7,8).

Tá ið tú tekur ímóti Jesusi og játtar hann og ikki bara hevur hann uppi í høvdinum, tá brotnar hol í myrka múrin, og himmalin letist upp yvir tær. „Verðið sterkir í Harranum og veldis mátti hansara." (Ef. 6,10). Tú ert skaptur í Guds mynd, og tú finnur ongantíð frið ella nøgdsemi, fyrr enn tú bjóðar Jesusi inn í hjartað sum Harra og Frelsara.

*Effie Campbell* umsetti.

# Til umhugsanar

Vit skulu ikki broyta Guds orð, tað er Guds orð, sum skal broyta okkum. Onkur má siga, at keisarin er nakin.

Gud kallar okkum til lærusveinar, ikki bara at dáma tað, hann sigur, sum tá ið vit trýsta á „like" á FB.

Vit eru ikki umborð á einum cruiseskipi, men umborð á einum krígsskipi. Tað ónda kom inn í verðina og ger nógv um seg, og vit hava fingið álagt, at vit skulu vera ljós og salt. Saltið skal verja móti rotinskapi. Jú meira tú brennur og virkar fyri Harran, jú meira mótstøðu fært tú. Tað er, sum tá ið tú setir teg inn í ein bil, koyrir tú bara 50, er mótstøðan so at siga eingin, men fert tú upp á 100, so merkir tú sanniliga mótstøðuna.

*Effie Campbell* umsetti.

# Bygg ikki títt egna ríki

Tað besta í lívinum er ókeypis, kostnaðarleyst, og tað er frelsan. Jesus hevur goldið eina ferð fyri allar fyri allar heimsins syndir og neglt syndarokningina á krossin. (Kol. 2,14). Liv ikki í luksusi. Bygg Guds ríki og ikki títt egna ríki. Menniskju mugu fáa at vita, at tað størsta, vit kunnu eiga, er syndanna fyrigeving.

*e.c.* ums.

---

„Ger sum vit," siga fjøllini, „legg skuggarnar (trupulleikarnar) niður við tínar føtur, og reis teg upp í sólina."

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8. mai | **Tekstur:** | Luk. 5,1-11 | **Bíbliuorð:** | Matt. 4,19 |
| 15. mai | **Tekstur:** | Luk. 10,25-37 Matt. 5,43-48 | **Bíbliuorð:** | Matt. 5,44 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74